NVD *Rit*

SERRITGERÐ
Thesis

TØKNIFRÁGREIÐING
Technical Report

UNDIRVÍSINGARTILFAR
Teaching Material

UPPRIT
Notes

# Túrfrágreiðing

## Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka

## 7.– 11. september 2006

*Cruise report: Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*

*7-11 September 2006*

Eyðfinn Magnussen



NVD*Rit* 2006:10

NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Faculty of Science and Technology University of the Faroe Islands

Heiti / Title **_Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka_**

**7.- 11. september 2006**

*Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*
*8-11th September 2006*

Høvundur / Author **Eyðfinn Magnussen**

Ritslag / Report Type Tøknifrágreiðing/Technical Report

***NVD*Rit** 2006:10
© Náttúruvísindadeildin og høvundurin

Útgevari / Publisher Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya
Bústaður / Address Nóatún 3, FO 100 Tórshavn, Føroyar (Faroe Islands)
Postrúm / P.O. box 2109, FO 165 Argir, Føroyar (Faroe Islands)
☎ • 🖷 • @ +298 352550 • +298 352551 • nvd@setur.fo

**Fólk frá FRS:** ReginKristiansen, Eydna í Homrun og Marit Petersen.
**Fólk við frá Fróðskaparsetrinum:** Eyðfinn Magnussen.

**Ábyrgd:** Eyðfinn Magnussen, Fróðskaparsetur Føroya.

**Endamál**: Hetta var tann triði og seinasti túrurin av heyst-yvirlitstrolingunum í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt hetta var vekt, tal og longdarbýti skrásett fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini vóru magakanningar gjørdar av toski, hýsu og upsa.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum og við vanligum grunni. Breitlarnir vóru 60 m og 120 m, Steinhamns lemmar, Minilog hita- og dýpdarmátari, Sea-Bird CTD og WP2 glúpur.

**Um túrin:** Farið varð av Havnini 6. september kl. 21.00. Fyrsta CTD-støðin varð tikin 7. september kl. 05.50. Seinasta støðin varð tikin 11. september kl. 12.25. Alla støðir vórðu tiknar. Í sýnishondbókini verður miðað eftir at taka 1200 nytrur av toski, hýsu og upsa; 400 av hvørjum. Av tí at ov lítið var at fáa, var hetta bert møguligt fyri hýsu. Av toski vórðu tiknar 160 nytrar og av upsa 245 nytrar.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Magarnir vórðu kannaðir umborð. Hitamátingarnar á trolinum og úrslitini frá Imponatorskipanini verða liðug rættað komandi dagarnar.

## Fyribilsúrslit

| FISKANAVN | Samlad veiða (kg) | | | Tal av prøvum | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2005 | 2006 | Munur (%) | Stak vektir | Longdar mátað | Nytrar | Magar |
| HÝSA | 6.607 | 2.886 | -56 | 1.402 | 2.363 | 402 | 87 |
| HAVMÚS | 2.273 | 1.840 | -19 | 67 | 106 | | |
| UPSI | 1.543 | 1.322 | -14 | 526 | 526 | 245 | 50 |
| GULLLAKSUR | 1.913 | 654 | -66 | 189 | 266 | | |
| TOSKUR | 1.303 | 596 | -54 | 164 | 164 | 160 | 76 |
| LOLIGO | 705 | 314 | -56 | 269 | 843 | | |
| KJAFTSVARTI KONGAF. | 223 | 211 | -5 | 43 | 101 | | |
| SVARTKJAFTUR | 407 | 125 | -69 | 105 | 155 | | |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 143 | 79 | -45 | 128 | 154 | | |
| LONGA | 218 | 75 | -66 | 25 | 26 | | |
| LÁLLA | 28 | 47 | 67 | 20 | 20 | | |
| STÓRI KONGAFISKUR | 48 | 45 | -6 | 28 | 28 | | |
| GLÝSUFISKUR | 13 | 26 | 96 | 109 | 183 | | |
| BLÁLONGA | 37 | 23 | -39 | 6 | 6 | | |
| TUNGA | 17 | 16 | -4 | 19 | 20 | | |
| BROSMA | 26 | 10 | -63 | 4 | 4 | | |
| SANDSPRØKA | 4 | 8 | 110 | 18 | 18 | | |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 0 | 7 | | 17 | 47 | | |
| BÚKSVARTI HÁVUR | 1.2 | 6 | 428 | 2 | 2 | | |
| SILVURMURTUR | 73 | 6 | -92 | 19 | 19 | | |
| HAVTASKA | 83 | 5 | -94 | 1 | 1 | | |
| KNURRHANI | 10 | 5 | -54 | 10 | 10 | | |
| KALVI | 17 | 4 | -79 | 1 | 1 | | |
| GLASKVOYSA | 13 | 2 | -84 | 4 | 4 | | |
| BLÁRIDDARI | 0.8 | 2 | 123 | 3 | 3 | | |
| KLINGRUSKØTA | 0 | 0.8 | | 1 | 1 | | |
| HUMMARI | 0.3 | 0.6 | 90 | 3 | 3 | | |
| KIKARAFISKUR | 0 | 0.5 | | 1 | 1 | | |
| JÁKUPSSKEL | 0 | 0.1 | | 1 | 1 | | |
| SJÓPRÓNUR | 0 | 0.01 | | 3 | 3 | | |
| LÍTLA BROSMA | 25 | | -100 | | | | |
| SVARTFISKUR | 21 | | -100 | | | | |
| NEVHÁVUR | 15 | | -100 | | | | |
| HVASSHVOYSA | 11 | | -100 | | | | |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 9 | | -100 | | | | |
| ROSSAMAKRELUR | 9 | | -100 | | | | |
| SILVURKALVI | 7 | | -100 | | | | |
| HVÍTINGUR | 5 | | -100 | | | | |
| TRANTKONGAFISKUR | 4 | | -100 | | | | |
| KIKARAFISKUR | 3 | | -100 | | | | |
| SKØTA | 3 | | -100 | | | | |
| MAKRELUR | 1.7 | | -100 | | | | |
| **Tilsamans** | **15.820** | **8.313** | **-47** | **3.188** | **5.079** | **807** | **213** |

***Talva 1:*** *Samlaða veiðan á Føroyabankatúrinum 7.-11. september 2006. Eisini verður samanborið við veiðuna heysttúrin 2005.*

**Fiskasløg:** Fingin vórðu íalt 30 ymisk fiskasløg á túrinum (*Talva 1*). Hetta er væl minni enn á heystið 2005, tá fingin vórðu 38 ymisk fiskasløg. Í 2004 vórðu eisini fingin 38 fiskasløg. Talið av fiskasløgum, sum verða fingin á yvirlitstrolingunum á Bankanum, er vanliga rættiliga støðugt; 33 til 34 ymisk sløg.

**Veiðan:** Samlaða veiðan hendan túrin var 8.313 kg. Hetta er 47 % minni enn fyri einum ári síðani, tá samlaða veiðan var 15.820 kg (*Talva 1*) og einans 32% av samlaðu veiðuni í 2004. Veiðan av flestu fiskasløgunum henda túrin var minni enn í fjør. Av teimum 30 fingnu fiskasløgunum, var veiðan minni fyri 19 av teimum. Fyri 6 teirra varð meira fingið (lálla, glýsufiskur, sandsprøka, búksvarti hávur, bláriddari og hummari), meðan 12 fiskasløg, sum vórðu fingin seinast, als ikki vóru fingin hendan túrin. Á *myndunum 1 – 6* verður greitt frá veiðuni av toski, hýsu og upsa og hvussu væl í holdum hesi fiskasløgini eru.

**Toskur:** Tilsamans vóru fingin 596 kg (163 toskar), av toski á Føroyabanka hendan túrin móti 1.303 kg í 2005. Minkingin er 54 %. *Mynd 1* vísir miðalkonditiónsfaktorin á toskinum. Konditiónsfaktorurin sigur okkum, hvussu feitur fiskurin er. Miðalkonditiónsfaktorurin hendan túrin var 1,02. Hetta er 1 % hægri enn í fjør, tá konditiónsfaktorurin var 1,01. Á *mynd 2* er víst miðalveiðan av toski í heyst-yvirlitstrolingunum á Føroyabanka árini 1991 og frameftir. Hendan túrin var miðalveiðan 21 kg pr. fiskitíma. Hetta eru 54 % minni enn árið fyri, tá veiðan var 45 kg pr. fiskitíma. Í 2002 var miðalveiðan 249 kg pr. fiskitíma.

**Hýsa:** Í alt vórðu fingin 2.886 kg av hýsu (*Talva 1*). Hetta er ein minking upp á 56 % samanborið við árið fyri. Miðalkonditiónsfaktorurin fyri samlaðu hýsuna var 1,04. Hetta er 9 % hægri enn í fjør (*Mynd 4*). Á *mynd 3* er víst miðalveiða av hýsu, fingin á heyst-yvirlitstrolingini síðani 1991. Her sæst, at veiðan øll árini hevur verið í støðugum vøkstri fram til 2002, tá veiðan var 1210 kg pr fiskitíma, men eftir hetta er veiðan minkað. Soleiðis var eisini í ár. Miðalveiðan av hýsu hendan túrin var einans 100 kg pr. fiskitíma, móti 228 kg í 2005. Ein minking uppá 56 %.

**Upsi:** Samlaða veiðan av upsa var 1.322 kg (*Talva1*). Hetta er 14 % minni samanborið við upsaveiðuna í fjør. Miðalkonditiónsfaktorurin á upsanum var 0,93. Hetta er 5 % hægri samanborið við 2005. Á *mynd 6* er víst miðalveiðan av upsa á heyst-yvirlitstrolingunum á Føroyabanka frá árunum 1991 og frameftir. Hendan túrin var miðalveiðan 46 kg pr. tov.




***Mynd 1**: Miðalkonditiónsfaktor (vekt/longd$^3$) hjá toski á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1992-2006.*




***Mynd 2**: Miðalveiðan av toski (kg/tíma) á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1991-2006.*




***Mynd 3****: Miðalkonditiónsfaktor (vekt/longd$^3$) hjá hýsu á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1996-2006.*




***Mynd 4****: Miðalveiðan av hýsu (kg/tíma) á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1991–2006.*




***Mynd 5****: Miðal konditiónsfaktor (vekt/longd$^3$) hjá upsa á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1996 til 2006.*




***Mynd 6****: Miðalveiðan av upsa (kg/tíma) á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1991-2006.*

**Magakanningar**

**Toskur**: 76 toskamagar vóru kannaðir. Høvuðsføðin hjá toski vóru krabbadýr (Pandalus, gággukrabbar og Galathea/Munida). Best umboðaðu fiskarnir vóru flatfiskar, glýsa og makrelur. Nakað av høgguslokki var eisini. Eingin nebbasild var funnin í magunum. Mest vanliga føðin hjá toskinum á Bankanum plagar annars at vera nebbasild og høgguslokkur.

**Hýsa**: 87 hýsumagar vórðu kannaðir. Føðin hjá hýsuni var ein blandingur av krilli, slangustjørnum, gággukrabba og skeljum.

**Upsi**: 50 upsamagar vórðu kannaðir. Í upsamagunum var nakað av svartkjafti. Av krabbadjórunum vóru serliga krill og amfipodur væl umboðaði.

Tórshavn 12. september 2006

Eyðfinn Magnussen_________